Eysturkommuna

Fundarinnkalling

Býráðið

Dagfesting: 29.10.2026 kl. 17:00
Málnr.:

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Magnus Skoralíð
Hanna Jensen
Ann Fuglø
Heri Mikálsson
Pól í Skorini
Unn Jarnskor Ellingsgaard
Tórur Didrik Djurhuus
Uni Rasmussen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:

Málsyvirlit			**Síða**
Til viðgerð:			
54/26	26/00432-3	Umsókn um stuðul - Víkingur 2026. Frágreiðing og tilmæli	3
55/26	25/00348-6	Umsókn um loyvi at selja grundstykki matr. nr. 199l SG	4
56/26	26/00449-3	Umbøn um ummæli - Marknaumskipan millum matr. nr. 144 pg 164 í Syðrugøtu - Umhvørvisstovan	6
57/26	25/00499-9	Umsókn um frávik - matr. nr. 47 í Syðrugøtu	7
Til viðgerð fyri afturlatnum hurðum:			
58/26	26/00436-5	Umsókn um eftirgeving av skuld	13

il viðgerð:

54/26 Umsókn um stuðul - Víkingur 2026. Frágreiðing og tilmæli

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Mentanarnevndin	20.10.2026	46/26	26/00432-3
2 Fíggjarnevnd	27.10.2026	40/26	26/00432-3
3 Býráðið	29.10.2026	54/26	26/00432-3

Málslýsing:
Umsóknin frá Víkingi er í ár meinlík teirri, ið varð móttikin í fjør. Kappingarárið 2025 royndist hampiliga væl og yngri leikarar á besta kvinnuliðnum gera nú eisini vart við seg. Umsókn og seinasti roknskapur er viðfest málinum. Stuðul tey seinastu árini: 600.000 kr.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fyri inniverandi ár hevur mentanarnevndin sett 400.000 kr. av til endamálið undir rakstrarkonto 524, “Stuðul til ítrótt”. Á fíggjarætlanini fyri 2026 eru 650.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, “Stuðul til ítrótt”. Per d.d. eru 416.000 kr. til taks.

Tilmæli

Mentanarnevndin 20. oktober 2026
Mentanarnevndin mælir til at játta 400.000 kr. í stuðli til Víking av konto 524, stuðul til ítrótt.

Fíggjarnevnd 27. oktober 2026
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

55/26 Umsókn um loyvi at selja grundstykki matr. nr. 199l SG

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Fíggjarnevnd	27.10.2026	44/26	25/00348-6
2 Býráðið	29.10.2026	55/26	25/00348-6

Málslýsing:

Eysturkommuna hevur móttikið fyrispurning frá eigaranum av matr. nr. 199l í Syðrugøtu um loyvi til at selja matrikulin víðari.

Lógir o.a.

Í § 6 í skeytinum stendur, at keyparin ikki hevur loyvi til at selja matrikulin víðari til annan enn Eysturkommunu.

Í § 8 í skeytinum er ásett, at Eysturkommuna hevur átalurætt.

§ 6

Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið til annan enn Eysturkommunu, fyrr enn sethús á stykkið.

Stk. 2. Sethús verða roknað sum bygd á stykkið tá bygging er liðug og nýtsluloyvi/bygg fingin frá byggivaldinum eftir reglunum í byggilógini og byggisamtyktini.

§ 8

Frammanfyri standandi § 3, stk. 3, og §§ 4, 5, 6 og 7 verða at lýsa sum servituttbindandi. Á hevur Eysturkommuna.

Við støði í hesum ásetingum skal støða takast til, um Eysturkommuna kann geva loyvi til, at matr. nr. 199l í Syðrugøtu verður seldur víðari til annan keypara enn kommununa.

Fíggjarligar avleiðingar:

Ongar

Tilmæli

Mælt verður til, at Eysturkommuna tekur støðu til fyrispurningin um víðarisølu av matr. nr. 199l í Syðrugøtu og, við støði í ásetingunum í § 6 og § 8 í skeytinum, ger av, um loyvi skal gevast til víðarisølu av matriklinum til annan keypara enn Eysturkommunu.

Fíggjarnevnd 27. oktober 2026

Mælt verður til at ganga umsóknini á møti og geva loyvi til víðarisølu av matr.nr. 199l í Syðrugøtu. Víst verður til notat dagf. 27.10.2026.

56/26 Umbøn um ummæli - Marknaumskipan millum matr. nr. 144 pg 164 í Syðrugøtu - Umhvørvisstovan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi - og býarskipanarnevnd	21.10.2026	30/26	26/00449-3
2 Býráðið	29.10.2026	56/26	26/00449-3

Málslýsing:

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn frá Umhvørvisstovuni, dagfest 6. oktober 2026, um marknaðarumskipan, har kommunan verður biðin um at ummæla umsóknina.

Marknaðarumskipanin snýr seg um, at matr. nr. 164 í Syðrugøtu, har hjallurin stendur, verður lagdur saman við matr. nr. 144 í Syðrugøtu.

Skjøl í málinum:

- Kort, mart. Nr. 144 og 164
- Umsókn til ummælis okkara mál nr. 26/22508

um

Fíggjarligar avleiðingar:

Ongar

Tilmæli

Umsitingin mælir til, at játta ummælið hjá Umhvørdisstovuni.

Byggi - og býarskipanarnevnd 21. oktober 2026

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

57/26 Umsókn um frávik - matr. nr. 47 í Syðrugøtu

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Journalnr.
1 Byggi - og býarskipanarnevnd	21.01.2026	2/26	25/00499-9
2 Býráðið	29.01.2026	2/26	25/00499-9
3 Byggi - og býarskipanarnevnd	21.10.2026	31/26	25/00499-9
4 Býráðið	29.10.2026	57/26	25/00499-9

Málslýsing:

Upprunin til málið
Úthús bygt ov tætt mark.

Lýsing av málinum
Eysturkommuna fekk fráboðan tann 7. november 2025 av eigaranum av matr. nr. 164 í Syðrugøtu. Eigarin boðaði frá, at grannin, eigarin av matr. nr. 47 hevði bygt eitt úthús uppá at markinum millum matr. nr. 47 og 164 í Syðrugøtu.

Tann 7. desember 2025 sendi eigarin av matr. nr. 164 eina skrivligari klagu til Eysturkommunu um viðurskiftini.

Lógir, ásetingar o.a.
Bygging sum ikki krevur byggiloyvi eru t.d. hjallar, vakstrarhús ella lítið úthús

> Ætlar tú at byggja úthús, vakstrarhús, hjall ella líknandi, kanst tú gera hetta uttan byggiloyvi. Treytin er, at bygningurin er minni enn tíggju fermetrar til støddar, og at bygningurin ikki er upphitaður.
>
> Harafturat skalt tú lúka hesi krøvini:
>
> Í mesta lagi tveir tílíkir bygningar kunnu vera á matrikklinum
>
> Frástøðan til aðrar bygningar á sama matrikkli skal í minsta lagi vera 2,5 metrar
>
> Frástøðan til mark skal í minsta lagi vera ein metur
>
> Hæddin á útveggjum ella tekju kann í mesta lagi vera 2,5 metrar yvir planeringshæddina

Ásetingarnar í Bygningskunngerðini fyri smáir bygningar á í mesta lagi 10 fermetrar:

2.2.3.5 Smáir bygningar á í mesta lagi 10 m²

Stk. 1
Ásetingarnar í kap. 2.2.3.5 eru bert galdandi fyri smáar bygningar á í mesta lagi 10 m². Tó verður eisini víst til kap. 2.2.3.4, stk. 2, nr. 2.

Stk. 2
Upp til 2 smáir bygningar kunnu gerast á hvønn matrikul, um treytirnar í nr. 1-3 eru loknar:

1) Víddin á tí einstaka bygninginum má í mesta lagi vera 10 m².
2) Fráleikin til aðrar bygningar á sama matrikli skal vera í minsta lagi 2,5 m.
3) Eingin partur av útveggjum ella tekju má vera hægri enn 2,5 m yvir planeringshædd.

Upplýsingar frá umsitingini
Starvsfólk frá teknisku umsiting hava verið á staðnum og staðfest at úthúsið ikki er bygt á tráð við galdandi reglur.

Úthúsið er bygt uttan byggiloyvi og lýkur ikki krøvini viðvíkjandi frástøðu til grannamark og hæddarviðurskiftum. Sambært reglum kunnu úthús, ið eru minni enn 10 fermetrar, byggjast uttan byggiloyvi. Tó skulu krøv um hædd og frástøðu til grannamark yvirhaldast, sum greitt er frá á heimasíðuni hjá Eysturkommunu. Í hesum førinum eru hesi krøv ikki hildin.

Úthús minni enn 10 fermetrar kunnu byggjast uttan byggiloyvi, tó skulu hædd og frástøða frá grannamarkið yvirhaldast, sum lýst á heimasíðuni hjá Eysturkommunu. Í hesum førum skal er hetta ikki yvirhildið.

Eysturkommuna hevur samtykt, at smærri bygningar, so sum hjallar, vakstrarhús og smá úthús, skulu standa minst ein metur frá mark. Hetta kravið er tó ikki ásett í bygningskunngerðini.

Við skriv dagfest 24. november 2025 varð eigaran av matr. nr. 47, heittur á um at flyta úthúsið.

Seinni er skriv móttikið frá eigaranum av matr. nr. 47, har hann greiðir frá viðurskiftunum og samstundis søkir um frávik til úthúsið.

Støða skal takast til um fráviki skal játtast.

Skjøl
- Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- Re: Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- 25/00458-13 – Re: Viðv. bygging á matr. 47 í Syðrugøtu
- Viðv: skúri.msg

- Klaga og áheitan um myndugleikaviðgerð av møguliga ólógligari bygging á matr. 47, Úti í Bø 24, Syðrugøtu.
- Umsókn um frávik.

Ískoyti 21.10.2026
Eysturkommuna hevur fingið áheitan frá Føroya Kærustovni um at taka málið upp til nýggja viðgerð. Grundgevingin er, at tað ikki framgongur av málinum, at umsóknin er viðgjørd við støði í almennu byggisamtyktini, kap. IV, § 23, sum ásetur reglur um hæddar- og frástøðuviðurskifti fyri bygningar.

Hóast hetta ikki er lýst í upprunaligu málslýsingini, hevur umsóknin verið viðgjørd sambært almennu byggisamtyktini fyri økið, B – bústaðarendamál, kap. IV, § 23.

Við nýggju viðgerðini verður grundarlagið fyri metingini av hæddar- og frástøðuviðurskiftunum tí lýst nærri, soleiðis at tað greitt framgongur, hvussu málið er viðgjørt í mun til ásetingarnar í byggisamtyktini.

Lógir, ásetingar o.a.
Almenna byggisamtyktin fyri økið, kap. IV, § 23

§ 23. Viðvíkjandi hæddar- og frástøðuviðurskiftum húsanna.

1. Eingi hús og eingin húsalutur má gerast hægri enn at fáast kunnu nóg góð ljósviðurskifti og hóskiligt samljóð við hús á sama grundstykki og hús á grannagrundum.

2. Frástøðan til bilskúr, úthús o.t. bygningar sínamillum, somuleiðis fráleikin millum hesar smærri bygningar og sethúsini, kann verða minkaður niður í 1 m., inni á egnum grundstykki. Út fyri vindeygu til búrúm og køk, skal frástøðan tó í minsta lagi vera 2,5 m. Veksur hetta ikki um vandan av eldi, kann verða loyvt at byggja fast millum bygningar.

3. Byggivaldið kann gera frávik frá ásetingunum í stk. 2, tá ið tað snýr seg um atvinnuøki og um bygging sum er gjørd, áðrenn almenn byggisamtykt kom í gildi.

4. Frástøðurnar, ið nevndar eru í stk. 2, verða máldar vatnrætt uttan mun til jarðarmun og vinkulrætt á linju ella flata yvirav. Hæddin - t.e. loddrætta hæddin máld av vatnrættum flata.

5. Útveggur á húsum, sum vendir móti grannamarki og ikki er í minsta lagi 2,5 m frá tí, skal gerast sum eldverjuveggur. Undantøk kunnu verða loyvd, um so er, at tað ber til fyri eldvanda, eitt nú tá ið bygt verður sambært góðkendari serstakari byggisamtykt fyri økið, og tá trygd er fyri, at frástøðan millum húsini, sum venda móti markið á teimum báðum grundstykkjunum, ikki verður minni enn 5 m.

6. Allir byggingar skulu standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.

Hesir smærru bygningar kunnu verða bygdir nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:

a) Longdin á bygninginum móti grannamarki, má ikki vera størri enn 8 m, Vendir bygningurin móti tveimum mørkum, má samlaða longdin ikki vera størri enn 12 m.
Viðmerking: Um søkt verður um byggiloyvi til bilskúr til 2 bilar, kann breiddin verða 6 m og longdin 6 m.

b) Bygningurin má ikki í einum fráleika upp til 2,5 m frá grannamarki vera hægri enn 2,5.

c) Eldstaður og skorsteinur mugu ikki vera grannamarki nærri enn 2,5 m.

d) Vindeygu mugu ikki vera móti marki, tá bygging er tættari marki enn 2,5 metur.

e) Takvatn skal verða hildið á egnari grund.

f) Veggur móti grannamarki, skal verða gjørdur sum eldverjuveggur. Frávik frá hesum er loyvt, tá ið tað ikki veksur um vandan av eldi.

Upplýsing frá umsitingin:
Sambært almennu byggisamtyktini B, bústaðarendamál, kap. IV, § 23, stk. 2, kunnu úthús við einum víddarmáli undir 10 fermetrar verða bygd uttan byggiloyvi. Tó skulu ásetingarnar um hædd og frástøðu til grannamark haldast. Sambært nevndu áseting kunnu úthús staðsetast 1,0 m frá grannamarki.

Í hesum føri er úthúsið á matr. nr. 47 staðsett nærri grannamarkinum enn 1,0 m.

Úthúsið er harumframt staðsett framman fyri køksvindeygað hjá grannanum á matr. nr. 164. Jarðarmunurin millum matriklarnar er umleið 1,1 m.

Hæddarmunurin millum túnið á matr. nr. 164 og terassubrettini á matr. nr. 47, har úthúsið stendur, er somuleiðis umleið 1,1 m. Úthúsið er bygt á terassubrettini og hevur eina hædd á 2,6 m, mált frá terassubrettunum.

Sambært almennu byggisamtyktini B, bústaðarendamál, kap. IV, § 23, stk. 6, er hægsta loyvda hæddin á úthúsum 2,5 m. Úthúsið er sostatt 0,1 m hægri enn ásetta hæddarmarkið.

Málið snýr seg sostatt um eitt úthús, sum bæði er staðsett nærri grannamarkinum enn ásett, og sum er hægri enn loyvda hæddin sambært almennu byggisamtyktini. Staðsetingin framman fyri køksvindeygað hjá grannanum og hæddarmunurin millum matriklarnar eru eisini viðurskifti, ið kunnu hava týdning í metingini av málinum.

Fíggjarligar avleiðingar:

Tilmæli
Umsitingin mælir frá at geva frávik fyri úthúsið, soleiðis sum tað nú er staðsett. Úthúsið er í stríð við galdandi reglur um frástøðu til grannamark og hædd. **Ískoyti 21.10.2026** Umsitingin mælir frá at geva frávik til úthúsið, soleiðis sum tað nú er staðsett. Úthúsið er í stríð við galdandi reglur um frástøðu til grannamark og hædd, umframt staðsetingina í mun til vindeyga hjá grannanum.

Byggi - og býarskipanarnevnd 21. januar 2026
Heri og Uni mæla til at geva frávik til úthúsið, soleiðis sum tað nú er staðsett.

Ann tekur støðu á býráðsfundinum.

Býráðið 29. januar 2026
Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meirlutanum í byggi- og býarskiapanrnevdini:

Atkvøður fyri:
Per Martin Gregersen, Uni Rasmussen, Heri Mikálsson

Atkvøður ímóti:
Magnus Skoralíð, Ann Fuglø, Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Tórur Didrik Djurhuus

Síðani bleiv atkvøtt um tilmælin hjá umsitingini:

Atkvøður fyri:
Magnus Skoralíð, Ann Fuglø, Pól í Skorini, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Tórur Didrik Djurhuus

Atkvøður ímóti:
Per Martin Gregersen, Uni Rasmussen, Heri Mikálsson

Byggi - og býarskipanarnevnd 21. oktober 2026
Ann og Heri taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Uni tekur støðu á býráðsfundinum.